# Norðoyastevnan kann fara at verða turrislig

**Um verkfallið hjá arbeiðarunum heldur fram tær komandi vikurnar, so verður ikki nógv til av teimum sterkaru løgunum til Norðoyastevnu. Deildin í Klaksvík er nú farin at merkja verkfallið av álvara, men í høvuðstaðnum er ikki so galið enn**

VERKFALS-AVLEIÐINGAR
*Solby A. Eliasen*

Í fjør var Norðoyastevna serstakliga váttlig leygardagin. Men tað komst ikki bert av rúsandi løgunum, sum fólk aloftast eiga inni til eina stevnu. Heldur var tað tað oysandi regni, sum førdi til tað. Um tað verður regn aftur í ár ella ikki, tað er ikki gott at vita enn, men um verkfallið hjá arbeiðarunum heldur fram, so týður nógv upp á, at norðoyastevnan í ár verður nakað turrislig, tá tað kemur til teir sterkaru løgirnar. Tí nú byrjar verkfallið av álvara at merkjast.

Jógvan Jacobsen, rakstrarleiðari á Rúsdrekkasølu Landsins sigur, at tey hava ikki flutt nakra vøru til tey støðini, har Strandfaraskipini sigla, síðani verkfallið varð lýst.

– Vit fáa tó flutt vøru til tey støðini, har tað er koyrandi. Tað vil siga til Saltangará og vestur í Vágarnar, sigur hann. Hann sigur eisini, at tey sjálvandi tóku hædd fyri, at verkfallið fór at koma, so tey fyltu goymslurnar kring landið áðrenn, men hann viðgongur tó nú, at um hetta heldur fram, so fer at verða tómligt til Norðoyastevnuna, sum verður um knappar tvær vikur.

-– Sum vit hava skilt, so er við at tømast í Klaksvík nú, og tað verður tískil ikki betur til Norðoyastevnu, um verkfallið varar so longi, sigur hann. Hann leggur tó afturat, at í Havn er ikki nakar stórvegis trupulleiki enn, og nógv er framvegis á goymslu.

Trygvi Poulsen, deildarleiðari í Klaksvík sigur, at hillarnar eru farnar at tømast av álvara í Klaksvík.

– Vit eru farin at mangla ávís sløg, sigur hann og væntar, at onnur sløg eisini fara at verða uppi í dag ella í morgin.

– Onkrar hillar eru tómar, og har kemur so heldur ikki meira, men so keypa fólk bara okkurt annað. Tað plagar so at vera, at tá tey ikki fáa júst tað slagið, sum tey vilja, so taka tey til takkar við onkrum øðrum ístaðin, sigur Trygvi Poulsen.

Tá tað kemur til brennivín, sigur Trygvi, at serliga gin er farið at ganga undan, meðan hini bæði sløgini, akvavit og vodka, enn eru í goymslunum.

Trygvi heldur tó ikki, at tað fer at verða nakar trupulleiki til Norðoyastevnu, tí tað letur til, at fólk eru byrjað at leggja inn undir seg. Hann sigur, at tey hava keypt meira enn vanligt farnu vikuna, og tað kann týða upp á, at tey vilja tryggja seg til stevnuna. Og harafturat heldur hann, at onkur helst fer at keypa inn aðrastaðni í landinum, har tað møguliga ikki er so tómligt.

– Tað er ongin ivi um, at handilin verður serstakliga tómur til Norðoyastevnu, um verkfallið heldur fram, men eg trúgvi, at flestu fólk fara at eiga inni til ta tíð, tí tað týður gongdin í søluni fyri tíðina uppá, sigur Trygvi Poulsen, deildarleiðari í Rúsuni í Klaksvík.

## Øl fer ikki at mangla

Bryggjaríini bæði í landinum merkja somuleiðis verkfallið væl. Framleiðslan liggur still, men frá báðum verður sagt, at goymslurnar eru fullar, so ølið fer ikki ganga undan. Jóhan Mortensen sigur, at Restorff´s hevur øl á goymslu til einar tríggjar vikur, meðan stjórin á Føroya Bjór stutt og greitt sigur, at ølið fer ikki at mangla.

Hvørki bryggjaríini koyra vøru út, og tað merkti høvuðsstaðurin í seinastu viku, tá Veðrølið var uppi. Bæði bryggjaríini hava tó tikið hædd fyri verkfallinum og roynt at fylt goymslurnar upp, áðrenn tað gjørdist veruleiki.

Tað standa verkfalsvaktir við goymsluna hjá Føroya Bjór í Havn, men Einar Waag sigur, at tað verður ikki koyrt út, so longi verkfall er. Tað sigur Jóhan Mortensen eisini.

– Vit hava eina klokkuklára avtalu við Havnar arbeiðsmannafelag, so vit fara ikki at gera nakað verkfalsrakt arbeiði, sigur hann. Tað standa tó ikki verkfalsvaktir við goymslurnar hjá Restorff´s í Havn og heldur ikki hjá Føroya Bjór í Klaksvík.

Handlarnir eru eisini farnir at tømast fyri sodavatn nú, men tað kemur ikki meira út, tí onki verður sum sagt koyrt út, meðan verkfall er.



Veðrølið hjá Føroya Bjór er uppi onkrastaðni, og í fleiri handlum eru sodavatnsgoymslurnar nú við at tømast

# Tómar hillar



*Tað er frítt val á øllum hillum, men ikki nógv at taka av. Ikki allastaðni standa hillarnar púra tómar, men í fleiri handlum.*
*Mynd: Álvur Haraldsen.*

**Nógva staðni, men langt frá allastaðni, eru hillirnar tómar**

VERKFALL
*Heri á Rógvi*

Hvat kann vera betri enn mánamorgunin enn ein túrur runt í ymsar handlar í Havnini. Vit hava myndatólið við. Nú skulu vit út og finna avleiðingar av verkfallinum, sum nú hevur staðið upp á síðani 8. mai.
Á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum vita tey, at fólk eru farin at ilskast inn á verkfallið. Fólk eru vorðin troytt av, at samfelagið ikki virkar sum vant, og hóast arbeiðarafeløgini hava sína fatan av veruleikanum, so er ikki nógv at ivast í, at verkfallið merkist.

2. mai kom frítíðarlønin á kontoina, og hóast hesin peningur helst skuldi verið nýttur seinni í summar, so kemur hann væl við nú.

Men hendan mánamorgunin eru ikki nógv fólk úti og keypa. Stóra parkeringsplássið uttanfyri FK í Hoyvík er mestsum tómt. Verkfall ellla ikki verkfall. Tað eru óivað fá, sum keypa inn mánamorgun.

Finn Nielsen, stjóri í FK, sigur, at talið av kundum hevur verið tað sama sum vanligt, men nú bensinið farið at ganga undan væntar hann færri vitjanir, og tað er kanska eisini farið at merkjast.

Ein túrur runt í FK í Hoyvík avdúkar, at tað, sum kann kallast frískt og grønt, ikki er til longur.

Har eru hillarnar skralltómar. Og frysti og køli boksirnar eru stórt sæð tómar eisini. Sjálvt rís og pasta eru hamstraði.

– Fólk fóru fyrst í teir stóru handlarnar, tá verkfallið byrjaði. Hjá okkum varð nógv útselt fyri einari viku síðani, men í onkrari deild eru enn eitt nú ostur eftir, sigur Finn Nielsen.

Hann heldur, at fólk flest taka tað við einum smíli.

– Hvørki tey ella vit fáa gjørt nakað sum er, sigur Finn Nielsen.

Men í FK hava tey enn slaktaravørur. Hetta skyldast, at tey hava egnan slaktara, og hesin fekk nýggja vøru beint undan verkfallinum og eigur nógv á gloymslu. Nokk til fleiri vikur, sigur Finn.

Men tær vørurnar, sum eru útseldar, undantikið mjólk, koma ikki aftur. Aðrar vørur eru eisini við at tømast út, men Finn roknar ikki við, at tað fer at merkjast so øgiligt afturat. Sjokuláta er enn at fáa, og tað verður tað eisini langt fram í tíðina – bæði hjá FK og aðrastraðni.

Og skuldi nakar verið svangur, so liggja í øllum førum nokk av turrum bógvum og tjógvum og bíða eftir einum komandi eigara.



*Tær frísku vørurnar eru farnar og koma ikki aftur fyrr enn eftir verkfallið*
*Mynd: Àlvur Haraldsen*

## Ikki alt tómt

Heldur ikki í SMS eru serliga nógv fólk ein tílíkan mánamorgunin. Í Miklagarði eru ikki bíðirøðir við kassarnar, men nøkur fólk eru komin oman at keypa sær eitthvørt. Tað eru kortini ikki tey heilt stóru innkeypini.

Eins og í FK eru ikki heilt nógvir pakkar av blæðum á hillunum. WC-pappíri er heilt burtur.

Men í Miklagarði er langt frá tómt. Tær nógvu av boksunum eru fullar av kjøti og aðrari vøru.

Kjøt trýtur ikki í langa tíð, fáa vit at vita.

Men sum alla aðrastðni er tað vøran, sum kemur hvørja viku, ið restar í.

Aðrastaðni, vit hava spurt okkum fyri, verður søgan úr FK og Miklagarði endurtikin. Tað er eitt sindur ymiskt, hvussu tómar hillarnar eru, men tað fríska er ikki til.

## Stórar mongdir

Poul Michelsen stjóri í heilsøluni við sama navnið roknar ikki við, at nakar fer at doyggja í hungri, soleiðis sum fylt varð upp áðrenn verkfallið.

– Vit selja ótrúliga uppundir verkfallið. Útfrá tí rokni eg við, at fólk hava keypt nógv undir seg, sigur Poul Michelsen.

Hann sigur, at hetta er eyðkent fyri hamstringina, at fólk keypa so nógv, tey kunna, so skjótt tey hava møguleikan.

Annars útflýggja tey hjá Poul Michelsen bert til sjúkrahús, ellisheim og annað og koyra mjólk út.

Eingin vøra bíðar við bryggjuni, sigur Poul Michelsen, sum ikki dugir at síga, hvat verkfallið fer at kosta heilsøluni.



# Flutningur av heilivági darvaður




*Tørvurin á brennievni fer helst at darva flutninginum av heilivági tað sum eftir er av verkfallinum hjá arbeiðarunum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Hóast Apotekið hevur fingið undantaksloyvi at flyta heilivág, so kann tað væntast, at fara at verða trupult at flyta heilivágin til tær smærru bygdirnar, tí nú er brennievni av álvara farið at ganga undan hjá Postverkbilunum, sum vanliga flyta heilivágin**

VERKFALS-AVLEIÐINGAR
*Solby A. Eliasen*

Frá Apotekinum verður sagt, at tað hevur ikki verið nakar trupulleiki at flyta heilivágin, tí tey hava fingið undantaksloyvi. Sostatt verður heilivágur fluttur við strandferðsluni til eitt nú Suðuroyar og Norðoyggjar. Men so er tað upp til støðini sjálvi at syrgja fyri, at heilivágurin kemur fram til rætta stað.

Men nú hevur ein annar trupulleiki stungið seg upp, sum ger, at heilivágurin óbeinleiðis verður raktur av verkfallinum kortini. Vanliga flytur Postverkið heilivágin út til smábygdirnar, men nú er dieseloljan við at verða uppi hjá teimum, so ikki er greitt, hvussu longi bilarnir fara at koyra afturat.

Jonna Hansen, apotekari á Tjaldurs Apoteki, sigur, at tað verður ein fundur millum postverkið og apotekið, har tað fer at verða greitt, hvussu longi afturat, tað fer at bera til at flyta heilivágin.

– Vit hava nóg mikið av heilivági, og apotekið koyrir sum vanligt, men tað er flutningurin, sum fer at geva okkum trupulleikar, so soleiðis koma vit at merkja verkfallið hóast alt, sigur hon.

Hon sigur eisini, at um so verður, at Postverkið hevur nóg mikið til at koyra heilivágin út, so kann tað framvegis fara at gerast ein trupulleiki, tí tað verður bert koyrt til eitt nú deildina í Runavík. So mugu fólk frá hinum bygdunum har um leiðir sjálvi avheinta tað har. Og soleiðis verður eisini aðrastaðni í landinum.

– Og hvussu skulu tey so kunna tað, um tey onki bensin ella diesel hava eftir, spyr Jonna Hansen. So tað verða smábygdirnar fyrst og fremst, sum fara at merkja tað.

Sum sagt so hevur heilivágur fingið undantaksloyvi, og tað hevur somuleiðis við sær, at tað verður vaskað í avgreiðslunum tveir tímar um dagin.

– Apotekið koyrir sostatt sum vanligt, men vit fara helst at fáa trupulleikar við flutninginum, sigur Jonna Hansen, apotekari.